SOSIALURIN HEVUR FINGIÐ NÝGGJ NUMMUR

tel 34 18 00

fax 34 18 01

GOMLU NUMRINI RIGGA IKKI LONGUR

teldupostur: post@sosialurin.fo • heimasíða: www.sosialurin.fo Sosialurin






## Okkum tørvar ítróttarskrivara

Dámar tær ítrótt? Dugir tú at arbeiða sjálvstøðugt og liggur væl fyri at skriva?

So ert tú kanska júst persónurin, sum vit søknast eftir á ítróttaredaktiónini.

Ítróttaskrivingin hevur seinastu nógvu árini verið raðfest ovarliga á Sosialinum, og fyri framhaldandi at halda fast um oddastøðuna á økinum søknast vit tí eftir einum medarbeiðara. Talan verður í fyrstu syftu um parttíðarstarv.

Umframt ítróttarskrivingina á Sosialinum verður partur av uppgávuni røkt av navnaøkinum, www. sportal.fo.

Vit rokna við, at tú hevur ein breiðan áhuga fyri føroyskum ítrótti, herundir ikki minst vetrarítróttargreinum. At tú ert álítandi og hevur góðan kunnleika til føroyska málið, og at tú hevur góð evni at bera teg fram á skrift.

Umsøkjarar við journalistiskari útbúgving hava fyrimun, men er hetta tó eingin treyt.

Er ynski at fáa nærri at vita um starvið, eru áhugaðir umsøkjarar vælkomnir at seta seg í samband við Jonhard Hammer á tlf. 223 369 ella Eirik Lindenskov á tlf. 216 409. Ella við at senda teldubræv til jonhard@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 20. oktober 2003

**Umsóknir skulu sendast til:**

Sosialurin
postsmoga 76
110 tórshavn

Merkið brævbjálvan **»umsókn«**

Sosialurin

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 560
**Navn:** Sp/f KG 293
**Adressa:** Stangavegur 142, 700 Klaksvík.
**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 09.10.2003
**Viðtøkudato:** 09.10.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Torleif Ragnar Steindor Sigurðsson, Stangavegur 142, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Torleif Ragnar Steindor Sigurðsson, Stangavegur 142, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Sp/f Agnar á Dul, Gerðagøta 31, 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 09.10.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og reka fiskiskip v.m.

*Skráseting Føroya tann 13. oktober 2003*

*Kristin Balle*

i Sosialurin

## Goymslufólk til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt hálvtíðarstarv sum goymslufólk leyst at seta sum skjótast. Starvið er tíðaravmarkað til 01.08.2004

HTM er deild Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 8 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Starvið fevnir m.a. um:**
- avgreiðslu
- skipan av goymslu
- goymslustýring
- smávegis umvælingar av hjálpartólum

**Vit søknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- viðkomandi útbúgving
- royndir frá líknandi arbeiði
- áhuga at arbeiða við hjálpartólum
- góð samstarvsevnir
- kunnleika til teldur á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 30. oktober 2003 kl. 14.00.




## Grót fæst

við at koma eftir tí.

**Tlf. 216600 ella 215609**

Sosialurin -tað loysir seg

## Avloysari til Føroya Lívstrygging

Søkt verður eftir avloysara til avgreiðsluna at byrja 1. november.

Starvið umfatar telefonavgreiðslu við vekslaran og skrivstovuarbeiði á teldukervi.

Løn sambært sáttmála við Yrkisfelagið Trygdina.

Skrivlig umsókn, merkt »avloysari« verður send

FØROYA LÍVSTRYGGING
Kopargøta 1, Quillinsgarður
Postboks 206, 110 Tórshavn